# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 04.04.2024 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt: Petur Súni Jacobsen

Nevndarskrivari: Erik Lervig



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar:** | | | |
| 14/24 | 24/00252-3 | Frágreiðing og tilmæli - 24/00252 Eykajáttan apríl 2024 | 2 |
| 15/24 | 24/00187-4 | 24/00187 - Stuðul til ritlist, Torfinnur Jákupsson. Frágreiðing og tilmæli | 3 |
| 16/24 | 24/00261-1 | 24/00261 - frágreiðing og tilmæli til mál - Spæli - og trivnaðarpláss 2024 | 4 |
| | | | |

**Til viðgerðar:**

## 14/24 Frágreiðing og tilmæli - 24/00252 Eykajáttan apríl 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 02.04.2024 | 8/24 | 24/00252-3 |
| 2 Býráðið | 04.04.2024 | 14/24 | 24/00252-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir eykajáttanir.<br><br>Talan erum fleiri ymiskar eykajáttanir fyri íalt 9.215.000,00 kr., harav 7.945.000,00 kr eru til arbeiði sum eru sett gongd ella samtyjkt í 2023, men sum ikki eru liðug enn. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Samlaðu íløgurnar fyri 2024 hækkað við 9,2 mió. og samlaða RLÙ lækkar við somu upphædd. Men av tí a at 7,9 mió. vóru játtaðar í fjør verður gjaldføri ikki ávirkað av hesum partinum av eykajáttanini. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttanir samb. hjál. yvirlitið á íalt 9.215.000,00 kr. og at peningurin verður tikin av innistandandi. |

**Fíggjarnevnd 02. apríl 2024**
Mæla til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti

**Býráðið 04. apríl 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, umframt at játtað 350 t.kr til Gøtubrá

## 15/24 24/00187 - Stuðul til ritlist - Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 26.03.2024 | 12/24 | 24/00187-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 02.04.2024 | 11/24 | 24/00187-4 |
| 3 Býráðið | 04.04.2024 | 15/24 | 24/00187-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Borgari í Eysturkommunu søkir um stuðul til ritlist. Søkt verður um kr. 500.000,- |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** 200.000 kr. eru settar av til satspuljuna 2024 (ritlist) av rakstrarkonto 522, stuðul til mentan. |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 26. marts 2024**
Mentanarnevndin mælir til stuðla hesi umsókn við 100.000 kr. Í hesum sambandi er ynskiligt, at lokal element skína væl ígjøgnum í arbeiðinum. Harumframt mælir mentanarnevndin til, at umsøkjarin fær umstøður til at skriva í Husinum hjá Karli í eitt tíðarskeið (skrivstovutíð, ikki innivist)

**Fíggjarnevnd 02. apríl 2024**
Mæla til at taka undir vi tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 04. apríl 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 16/24 24/00261 - frágreiðing og tilmæli til mál - Spæli - og trivnaðarpláss 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 21.03.2024 | 3/24 | 24/00261-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 02.04.2024 | 10/24 | 24/00261-1 |
| 3 Býráðið | 04.04.2024 | 16/24 | 24/00261-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru avsettar kr. 750.000 til íløgur í spæli – og trivnaðarpláss í kommununi.<br><br>Umsitingin hevur ynski um at gera trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík liðugt. Plássið talan er um, er ein partur av gøtuni, sum gongur framvið ánni. Plássið er gjørt ávegis liðugt. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru avsettar kr. 750.000 á konto 52011 – Spæli – og trivnaðarpláss<br>Mett verður at kostnaðurin at gera trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík liðugt er kr. 350.000. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at gera trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík liðugt og at Umhvørvis – og trivnaðarnevndin ger ein raðfesting av, hvat restina av peninginum skal brúkast til. |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 21. mars 2024**
Mæla til at eitt spælipláss verður gjørt undir Gøtueiði og at peningur til trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík verður funnin á aðrari konto.

**Fíggjarnevnd 02. apríl 2024**
Mæla til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini, men at peningurin verður tikin av konto 61411 (Fríðkan)

**Býráðið 04. apríl 2024**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

fundurin lokin kl. 18.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen